# Nøvn

## Diamantbrúdleyp



Hósdagin 21. oktober eru 60 ár liðin, síðan hjúnini Judith (fødd Holm Jacobsen) og Osvald Kjærbo gingu saman í hjúnalag.

Foreldrini hjá Judith vóru Anna Sofía og Dánjal Jákup Jacobsen. Anna Sofía var dóttir Marsannu og Jógvan í Skorini á Eiði. Dánjal Jákup var sonur Jacobinu og Poul Jacobsen úr Leynum. Judith búði barnaárini undir Glasheyggi í Havn, hagar familjan var flutt. Sum ung arbeiddi hon í bakarínum hjá Frants Restorff og í Skipahandlinum, umframt í Vega, sum var eitt av virkjunum hjá pápanum.

Foreldrini hjá Osvald vóru Kristianna Jacobsen, ættað av Glyvrum. Hon var systir navnframa rokskiparan Napoleon á Glyvrum. Pápin var Tummas Jákup Kjærbo úr Sumba. Tummas Jákup var sonur Sunnuvu í Lopra og Thomas Jacob úti í Stovu, og tey fingu sær seinni eftirnavnið Kjærbo.

Aftaná lokna skúlagongd á Tvøroyri fór Osvald í 1943 at arbeiða á politistøðini í Havn, og árini 1944-45 arbeiddi Osvald sum fulltrúi hjá sýslumanninum í Klaksvík. Haðani fór Osvald at arbeiiða í reiðaravirkinum hjá Christian Holm Jacoblsen í Havn, og seinni á sildaverksmiðuni hjá Gunnari Holm Jacobsen í Kollafirði.

Í 1956 byrjaði Osvald egið virki við søluumboðum og heilsølu av ymiskum vørum. Hetta virki hevði inntil hann legði frá sær, gott 70 ára gamal. Osvald kom sum ungur til persónliga trúgv á Jesus Kristus, og er hann óiva mest kendur millum manna fyri sítt arbeiði í Harrans verki, har hann hevur havt ein virknan lut innan brøðrasamkomurnar. Umframt at bera orðið fram á møtum, hevur Osvald í ein mansaldur verið leiðari fyri Emmaus bíbliubrævskúlan í Føroyum. Hann hevur latið úr hondum hópin av traktatum, bíbliubrævskeiðum og greinum um bíbilsk evni . Osvald hevur á egnum forlagið givið út 8 bøkur seinastu 7 árini, og onkur bók er á veg. Tær bygdirnar eru fáar í Føroyum, sum Osvald ikki hevur vitjað í sambandi við møtir, bæði inni og úti, og altíð ger hann sær ómak at vitjað húsini við eini innbjóðing og eini traktat.

Judith og Osvald búsettust úti í Grønlandi í Havn, og tey eiga fimm døtur: Anna og Katrin sum búgva búgva í Havn, Kristvør sum býr í USA, og Guðrun og Jórun sum búgva í Keypmannahavn.

Dagurin verður hildin saman við familjuni.

## Farvæl Sevmýri

Jógvan Arge, útvarpsmaður



Nú søgdu teir so ofta í sjónvarpinum, at tað var við sorgblídni, teir søgdu Sevmýri á Tvøroyri farvæl. Og tað skilji eg væl. Tað er eisini hugstoytt at staðfesta, at nú verða ikki fleiri rættiligir fótbóltsdystir spældir har.

Fótbóltssambandið hevur boðað Tvøroyrar Bóltfelag frá, at vøllurin á Sevmýri lýkur ikki treytirnar, sum settar verða til kappingarvøllir. Hetta hevur verið undir uppsigling í fleiri ár, men kortini hava tvøramenn onki alternativ fingið til vega – so teir eru vallarleysir.

Tað er nú ein syndarlig støða hjá aldursforsetanum í føroyskum fótbólti. Føroyska fótbóltsvøggan stóð á Sevmýri. Har byrjaði sýslumanssonurin Poul Effersøe at læra sínar bygdarmenn at spæla fótbólt soleiðis, sum hann hevði lært hann í Danmark – ivaleyst á Sorø og í Keypmannahavn.

Á Sevmýri spældu tvøramenn sínámillum, og tað tók nógv ár, áðrenn teir høvdu nakran at spæla ímóti í øðrum oyggjum. Tvøramenn vóru við, tá fótbóltsdystur var heima á Sandi á hvítusunnu í 1904, og teir komu fyrstu ferð til Havnar at spæla í 1909.

### Vunnu mong steyp

Teir vóru fremstir í leikum í mong Harrans ár. Vunnu eitt kent steyp fyri og annað eftir, bæði fyri fyrra heimsbardaga og millum heimsbardagarnar. Undir seinna heimsbardaga vunnu teir ein tann fyrsta føroyameistaraskapin. Í fjørutinum vunnu teir onkran aftrat og eisini í fimmtiárunum.

Í kappingini um Ísafjarðarsúluna kappaðust teir á jøvnum føti við HB tey fyrstu mongu árini, og í sjeytiárunum gjørdu teir bart í nøkur ár við tveimum fylgjandi meistaraskapum í 1976 og 1977. Tá nyttaði ein fótbóltsdystur einki, um TB ikki var við.

Og tær størstu upplivingarnar hesi árini vóru á sjálvari Sevmýri. Har vóru lív og glaðir dagar. Kvinna og maður úr allari Suðuroynni við síðulinjuna, og mangar góðar glósur fuku millum bóltarnar – bæði á vøllinum og uttanfyri. Aftaná stóð Klubbin opin fyri hugaðum gestum. Har var ikki minsta reypið.

### Appelsin í turbanina

Nakað seint í áttatiárunum datt eitt FM aftrat sum ein appelsin í turbanina hjá TB. Fleiri lið høvdu møguleikan at vinna. TB helst tann minsta. Men hini úrslitini lagaðu seg soleiðis, at TB lá ovast, tá avtornaði hendan seinnapartin.

Ongin hevði droymt um hetta, so steyp var einki á Sevmýri. Men eina góða løtu eftir, at dystirnir vóru lidnir, og teir bilsnu tvøramenninir so smátt høvdu fingið málið fyri seg aftur, dagaði tyrlan hjá Atlantsflogi undan á fjørðinum og setti seg á Sevmýri við FSFarum, steypinum og heiðursmerkjunum.

Mervin Dimon var ein av hetjunum í TB gjøgnum tíðirnar. Spældi høgri vongur í nógv ár, bæði á 1. liði og á landsliðnum. Hann stóð uppi undir TB-húsinum hendan dagin, og eg lokkaði hann at siga nøkur orð í útvarpinum, meðan bíðað varð eftir ceremoniini. Sjálvt hann var kløkkur av hesum óvæntaða heiðrinum til hjartabarn hansara, men sjálvsagt var hann uppiborin.

### Vøllur í Trongisvági

Hetta var kanska tann seinasta veruliga stóra fagnaðarløtan á Sevmýri. Annars eru minnini mong hjá mongum – og teimum kann FSF so ikki seta bann fyri.

Fyrsti fótbóltsdystur, eg varpaði út, var júst á Sevmýri. Hetta var jóansøkudag 1965, og dysturin var millum TB og B36. Havi gloymt úrslitið, men veðrið var onki serligt. Regnaði rættiliga illa beint í andlitið, so eg kendi meg ikki av tí besta, men missiónin varð fullførd.

Síðani hava mangar góðar og spennandi løtur verið á Sevmýri. Tí er tað sárt at staðfesta, at ongar slíkar koma aftur.

Men spurningurin um nýggjan fótboltsvøll á Tvøroyri er gamal. Eg minnist, at Mervin og teir longu í sekstiárunum arbeiddu fyri at gera nýggjan fótbóltsvøll inni í Trongisvági – ásannandi, at Sevmýri var eingin varandi loysn.

Tað fanst ein mynd, sum fór um alt ríkið, har Mervin stóð sum ein annar Napoleon og peikaði, hvar vøllurin skuldi verða.

Kanska kemur gongd á loysnina nú!

## Andlát

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæri pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Helgi Øster**
**ættaður av Eiði búsitandi í Tórshavn**

andaðist á Lágargarði sunnudagin, 89 ára gamal.
Kistan fer av Lágargarði hósdagin kl. 18.00.
Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni fríggjadagin kl. 13.00.

***Familjunnar vegna***
**Rúni, Guðrið, Ólavur og Mikkjal við familjum**

Tey, ið vilja minnast Helga, kunnu lata Handarustovu á Lágargarði eina gávu, konta í Eik.